Todi sleppur ikki upp í part



Todi Jónsson tykist í løtuni vera tann aftasti í røðini í hørðu kappingini um álopsplássini í FCK. Hóast Zuma hevði leikbann, so fekk Todi bert seinastu góðu løtuna á vøllinum, og tá var dysturin longu avgjørdur

Hóast Zuma var skaddur og hinir báðir álopsmenninir ikki megnaðu at fáa mál burturúr møguleikunum, so varð Todi ikki skiftur inn fyrrenn seinnapartin av 2. hálvleiki, tá FCK tapti 3–0 í Esbjerg

ÚTISETI
Jóannes Hansen

Í løtuni er tað ikki serliga hugaligt hjá Toda Jónsson í FCK. Eitt er, at liðið mikukvøldið fyri aðru ferð á rað tapti í Jyllandi. Eftir 3–0 tapið í Aalborg fyri hálvari aðru viku síðani var FCK hesa ferð í Esbjerg, og har løgdu teir aftur rygg til 3–0 tap.

Hin síðan av óhugaligu søkini er, at Todi Jónsson ikki fær møguleikan at vísa, um hann kanska er betri førur fyri at skora mál, enn hinir í FCK álopinum eru tað. Zuma var leikbannaður, tá FCK var í Esbjerg, og tí varð roknað við, at Todi fór at sleppa framat frá fyrsta bríksli. Men tað gjørdi hann ikki. Hans Backe valdi Peter Møller, sum sigst hava staðið seg sera væl undir venjing síðstu tíðina, til annað álopsplássið, og Jörgen Pettersson til hitt plássið.

Todi Jónsson kom ikki á vøllin fyrrenn seinna umfarið var hálvrunnið. Tá avloysti hann Carsten Fredgaard, sum hevði verið ytstur á miðvøllinum í vinstru. Todi hevði onkra skotroynd ímóti málinum hjá Esbjerg, men tá heimaliðið í 72. minutti økti um leiðsluna til 3–0, var greitt, at øll stigini fóru at vera í Esbjerg.

Todi var millum fýra FCK spælarar, sum fingu gula kortið.

At føroyski álopsspælarin fyri tíðina so sjáldan sleppur framat ímillum teir fyrstu ellivu kann ikki skiljast øðrvísi, enn at venjarin ikki heldur hann vera á toppinum. Fyri ikki so langari tíð síðani segði Hans Backe, at tá hann hevði fýra góðar álopsspælarar at velja ímillum, so gav tað honum møguleika at brúka teir, sum akkurát vóru á aldukambinum.

Men mikukvøldið var tað ilt at siggja, at álopsspælararnir vóru á toppinum. Tá Todi og Zuma hava verið í álopinum hevur styrkin verið innanhýsis spælfatanin og skjótleikin. Mikukvøldið var lítið samanspæl millum fremstu FCK spælararnar, og Jörgen Pettersson hevur framvegis sera ilt við at skora mál og harvið at prógva, at FCK í summar gjørdi eitt gott keyp. Hesa ferð hevði hann risa møguleika, tá hann varð spældur leysur mitt fyri, men tá hann úr sekstan metrum og mitt fyri lyfti upp um málverjan, ið kom út ímóti, fór bólturin við síðuna av.

Vónbrotin venjari

Hans Backe gav ilt av sær eftir stóra tapið. Tað var sum at hoyra Berti Vogts á Svangaskarði leygardagin. FCK venjarin helt ikki, at hansara spælarar høvdu gjørt stórvegis til nyttu í 1. hálvleiki, og hann helt ikki, at nøkur orsøk var at vísa á, at fýra av føstu monnunum ikki vóru við. Tað átti liðið væl og virðiliga at tolt.

Einasti málmøguleikin hjá FCK í 1. hálvleiki var, tá verjuspælarin Boris Zivkovic tveir minuttir undan hvíldini drønstútaði hornasparksinnlegg úr høgru í tvørtræið.

Fyrra partin av seinna umfarinum var FCK venjarin ikki misnøgdur við. Tá hevði FCK fimm heilt stórar møguleikar at minka um munin, sum var 2–0. Eitt nú sendi miðvallarin Peter Nielsen frispark úr sekstan metrum og í tvørtræið, og eina ferð bjargaðu heimamenninir á strikuni eftir horna.

Framúr áhugi

Áhugin fyri fótbóltsdystinum í Esbjerg mikukvøldið var sera stórur. Teir høvdu roknað við átta túsund áskoðarum. Men góða veðrið, undanvindurin hjá heimaliðnum og forkunnugu gestirnir úr høvuðsstaðnum, tóku teir, sum høvdu roknað, av bóli. Tað møttu knappliga níggju túsund upp, og tað høvdu alla orsøk at vera í góðum hýri, tá tey fóru til hús aftur.

Grundin undir 3–0 sigrinum varð løgd í 1. hálvleiki, tá Esbjerg spældi sera væl, ágangandi og málsøkið. Liðformaðurin Jess Thorup setti hol á beinanvegin. Avgjørt besti maður á vøllinum var 20 ára gamli Tommy Bechmann, sum Esbjerg í summar keyptu úr FC Aarhus. Hann er sonur Henrik Bechmann, sum síðst í sjeyti og fyrst í áttati árunum saman vóru við Lars Lundquist var málsøkið álopspar í Skovbakken og AGF. Tað var hesin Tommy, sum í 4. minutti royndi seg við skoti. Rune Pedersen, sum loysti skadda Magnus Kihlstedt av í FCK málinum, hálvbjargaði, og so var liðformaðurin fyrstur á.

Í 26. minutti økti Tommy Bechmann um leiðsluna, og hann átti eisini sín lut í 3–0 málinum, sum Esbjerg skoraði í 72. minutti. Bechmann tveitti ógvuliga langt innkast úr høgru, og miðvallarin Hans H. Andreasen var hægstur og stútaði framvið FCK málverjanum.

Talan er ikki enn um kreppu í FCK, men at teir enn eina ferð taptu stórt í Jyllandi var staðfesting av, at tað ikki er soleiðis, at FCK er í serflokki, og at øll hini liðini eru í einum flokki. Støðutalvan vísir, at øll liðini í superliguni eru fór fyri at vinna á øllum.

Fiskimálaráðið
Sjóvinnufyrisiting

Avloysari fyri skrivstovufólk

Sjóvinnufyrisitingin søkir hervið eftir einum skrivstovufólki til eitt avloysarastarv vegna barnsburðarfarloyvi.

Sjóvinnufyrisitingin er skipað sum deild í Fiskimálaráðnum.

Starvið inniber m.a. hesar uppgávur:
- málsviðgerð innan skipaskráseting, herundir Føroya Skipaskráseting, FAS og bátayvirlitið í Tórshavn
- skráseta heimildir, pantirættindir, brúksrættindir og onnur rættindir
- geva út tjóðskaparbrøv
- vanligt skrivstovuarbeiðið
- telefonavgreiðsla

Førleikakrøv:
Til starvið krevst viðkomandi utbúgving sum t.d.:
- skrivstovuútbúgving ella líknandi útbúgving
- góð evni at samskifta á føroyskum, norðurlendskum máli
- telduførleika á brúkarastøði
- góðan førleika at arbeiða sjálvstøðugt
- góð samstarvsevni

Setanartreytir:
Starvið verður lønt sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag. Setanarøkið fevnir um Fiskimálaráðið og stovnar undir tí, umframt hini ráðini og Løgmansskrivstovuna. Tænastustaðurin í løtuni er Sjóvinnufyrisitingin.

Umsóknir saman við avriti av prógvum og møguligum viðmælum, skulu vera Sjóvinnufyrisitingini í hendi í seinasta lagi 26. september 2002 kl. 15.30.

Umsóknir skulu sendast til:
Fiskimálaráðið,
att: Sjóvinnufyrisitingin
Postsmoga 347
110 Tórshavn

Fyrispurningar viðvíkjandi starvinum fáast við at ringja til Fiskimálaráðið á telefon 353030 og tosa við Kaj P. Mortensen, aðalstjóra.

DEBAT OM GRUNDLOVEN
Støtte til lokale aktiviteter

Folketinget har besluttet at gennemføre en folkelig debat om det danske folkestyre. Den skal give et indtryk af, om befolkningen støtter en modernisering af grundloven. Debatten gennemføres frem til 30. juni 2003.

Som et af flere initiativer har Folketinget afsat fire mio. kr. til støtte af lokale aktiviteter med grundloven i fokus. Det maksimale støttebeløb er 25.000 kr.

Næste ansøgningsfrist er den 4. oktober 2002.

Ansøgningsskema og yderligere information kan fås på www.grundlovsdebatten.dk

GRUNDLOVSDEBATTEN

Tvingsilssøla

Hósdagin 17. oktober 2002, kl. 09.30 verður á Dómaraskrivstovuni, C. Pløyensgøta 1, 100 Tórshavn, hildin tvingsilssøla yvir ognina **matr. nr. 61h, Sandavágur.**

Ognin er eini sethús til støddar 144 m² í stovu og loftshædd við tilbygdum kjallararúmi og hjalli 20 m². Húsini eru gjørd av timbri og betong og takt við decramastik. Í stovuhæddini er durur, gongd, grovkøkur, køkur, stova, 3 kømur, stórt baðirúm og hjúnakamar við lítlum baðirúmi. Loftið er óinnrættað. Grundøkið er 943 m².

Sølan er umbiðin av **Ólavur Jákup Kristoffersen, adv., Fr. Petersensgøtu 9, 100 Tórshavn, tlf. 311145, e-mail** ojk@advlaw.fo**, (j. nr. 20020231)**, sum kann geva nærri upplýsingar, og sum nærri avtala kann gerast við, um ynskt verður at síggja ognina.

Føroya Fútarættur
27. august 2002

CAFÉ NATÚR

Talentkvøld á Café Natúr

Hóskvøldið 12. september kl. 21.00

Nú hevur tú møguleikan!
Einstaklingar og orkestur
Situr tú inni við fjaldum tónlistarligum evnum, so hevur tú nú møguleikan at koma oman á Café Natúr at royna teg
Øll teknisk útgerð er á staðnum, so tað er bara at koma við instrumentinum sum tú spælir á.
Tilmelding: Ring til Búa Dam á 267212 millum 19.00-21.00 hóskvøldið.
Hevur tú annars spurningar hesum viðvíkjandi, er tú hjartaliga vælkomin eisini at ringja til Búa um tað.
Vit gleða okkum... so kom oman og vísi okkum hvat tit duga til

12. MAÐUR
FAROESE FOOTBALL SUPPORTERS

Hey tit...Føroysku Fótbóltsáskoðarar.....
Skora eitt mál afturat á Café Natúr....
Vit "hittast" á cafeini fríggjakvøldið 13. september við góðum "fótbólts tilboðum"
Nýt eisini høvi at stuðla okkara "12 manni", annaðhvørt við at gerast limur ella ogna sær t.d. ein kepp, ella bert fyri at forvitnast um okkara 12. mann.
Komi og spæli við... tá vit hittast og hugna okkum á caféini

Unga Tjóðveldið skipar fyri almennum hugnakvøldi á Café Natúr
Komandi leygarkvøld 14. september kl. 19.00 skipar Unga Tjóðveldið fyri almennum hugnakvøldi á cafeini, við ymsum røðarum og Knút Eysturstein spælir guitar.
Orðið er fritt, og vit fara sjálvandi at hugna okkum dúgligani

CAFÉ NATÚR
Tlf. 31 26 25

Sosialurin 311820

Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:

Skrásetingar-nr. Sp/f 3433
Navn: Sp/f Hami
Adressa: Norðari Ringvegur 13, 100 Tórshavn
Kommuna: Tórshavnar Kommuna
Stovningardato: 09.09.2002
Viðtokudato: 09.09.2002
Kapitalur: Kr. 80.000,00
Inngjaldingarháttur: Kontant kr. 80.000,00 til kurs 100.
Stovnari: Halgerð Midjord, Norðari Ringvegur 13, 100 Tórshavn.
Stjórn: Halgerð Midjord, Norðari Ringvegur 13, 100 Tórshavn.
Tekningarreglur: Felagið verður bundið við undirskrift stjórans.
Grannskoðari: Grannskoðaravirkið Hermund Jacobsen, J. Paturssonargøta 18, 100 Tórshavn.
Roknskaparár: 01.02. - 31.01
Fyrsta roknskaparár: 09.09.2002 - 31.01.2003
Endamál: Endamál felagsins er at reka útleiguvirksemi, handil og annað virksemi í hesum sambandi.

Skráseting Føroya tann 11. september 2002

Kristin Balle

HEILSUFRØÐILIGA STARVSSTOVAN

Falkavegur 6, 2. hædd
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands
Tel. +298 35 64 00
Fax. + 298 35 64 01
E-mail: feagency@hfs.fo
www.hf.fo

Landing av feskum fiski frá skipum og bátum

Sambært kunngerð nr. 122 frá 24. august 2001 um viðgerð, keyp og sølu av fiski og fiskavørum á landi, kunnu bert landingarmiðstøðir, sum eru løggildaðar av Heilsufrøðiligu starvsstovuni, landa ella taka ímóti feksum fiski frá skipum og bátum.

Boðað verður frá, at Heilsufrøðiliga starvsstovan frá september 2002 hevur váttað løggilding til niðanfyri nevndu landingarmiðstøðir, treytað av at virksemið og tíðarkarmar fyri lokin krøv verða sum ásett.

Løggildaðu landingarmiðstøðirnar eru:
Beta, Saltangará
Fiskamarknaður Føroya, Toftir
Fiskamarknaður Føroya, Klaksvík
Fløgan, Vágur
Føroya Fiskavirking, Vestmanna
Føroya Fiskavirking, Miðvágur
Føroya Fiskavirking, Runavík
Føroya Fiskavirking, Tvøroyri
Koldefjord Pelagic, Kollafjørður
Landingarmiðstøð v. Vinjard Joensen, Sørvágur
Sandoy Seafood, Sandur
Sandoy Seafood, Skopun
Snodd, Toftir

Landing og móttøka á smærri plássum, sonevnt útistaðarvirksemi, skal fara fram undir fyriskipan av einum av omanfyrinevndu løggildaðu eindum.

Dagføringar av omanfyri nevnda lista kunnu lesast á heimasíðuni hjá Heilsufrøðiligu starvsstovuni, www.hfs.fo

FOOD AND ENVIRONMENTAL AGENCY